# Spennandi og mennandi at vera ferðaleiðari

**Um tú ert fyltur 18 ár og dugir enskt, kanst tú upp á fýra vikur læra til ferðaleiðara og fáa eitt spennandi og læruríkt arbeiði, segði Súsanna Gunnarsson frá "Service & Co" í Spania á fundi í Miðlahúsinum**

TEMAKVØLD
*Magnus Gunarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Einasta treyt fyri at koma inn á skandinaviska ferðaleiðaraskúlan "Service & Co" í Santa Súsanna, nærhendis Barcelona í Spania, er at tú ert fyltur 18 ár, og at tú kanst tosa enskt, segði Súsanna Gunnarsson á ferðaleiðarakvøldinum í Miðlahúsinum mánakvøldið, sum føroyska ferðaskrivstovan "Tora Tourist Traffic" og "Service & Co" skipaðu fyri.

Súsanna er lærari á Service og Co, ið er ein ferðaleiðaraskúli, sum við "garanti" kann bjóða arbeiði til allar teir góðkendu næmingarnar. Tað merkir, at tá tú hevur fingið títt prógv sum ferðaleiðari, kanst tú síggja fram til eitt spennandi arbeiði í útlandinum, sigur Súsanna. Næmingar, sum fáa prógv á skúlanum, kunnu rokna við at verða kontaktaðir av teimum stóru ferðaskrivstovunum í Skandinavia, sum bjóða teimum arbeiði.

Umleið hálvthundrað føroyingar hava millum ár og dag gingið á hesum skúla.

Føroyingar eru væl umtóktir. Teir hava góð viðurskifti til tey Skandanavisku málini, teir kunnu tosa við øll og skilja danskt, norskt og svenskt, og tað er ein fyrimunur hjá teimum stóru ferðaliðunum, sigur Súsanna, ið sjálv hevur fingið sína útbúgving á skúlanum.

Skúlin skipar fyri trimum skeiðum upp á fýra vikum um árið. Millum 110 og 160 næmingar luttaka hvørja ferð. Hóast flestu næmingarnir eru ungir, eru tað eisini nógv tilkomin fólk, sum læra til ferðaleiðara. Næmingarnir mennast nógv persónliga og læra at framføra seg, sigur Súsanna.

Í Føroyum er tað Tora Tourist Traffic v. Sámal Bláhamar, sum umboða ferðaleiðaraskúlanum hjá Service & Co. í Barcelona. Sámal, sum sjálvur gekk á skúlanum í 2002, sigur, at skúlin er vorðin meira viðkomandi hjá okkum, nú ein av lærarunum á skúlanum er føroyingur.

Upplýsingar um skúlan eru at finna á: www.guide.fo. Áhugaði kunnu venda sær til ferðaskrivstovuna Tora Tourist Traffic á tel. 215667. Súsanna er í Føroyum til hósdagin 17. mai, og kunnu áhugað ringja til hana á tel. 58 82 48.




*Starvið sum ferðaleiðari er spennandi og læruríkt, segði Súsanna Gunnarsson frá "Service & Co" í Barcelona á fundi í Miðlahúsinum*



*Sámal Bláhamar frá ferðaskrivstovuni "Tora Tourist Traffic" og Ólavur Poulsen frá "Lakeside Sightseeing" á Vatnsoyrum*



*"Team Her Sonissos 2005". Súsanna er uttast til vinstru*





*Góður stemningur í Miðlahúsinum mánakvøldið, tá skandinaviski ferðaleiðaraskúlin "Service & Co" og Tora Tourist Traffic skipaðu fyri ferðaleiðarakvøldi*



*Skandinavisk mynd frá Service & Co. Anna (svensk), Súsanna (føroysk/norsk) og Pauline (donsk)*